## Cannavaro nær metinum

Við 124 dystum er Fabio Cannavaro bara tveir landsdystir frá dystarmetinum, sum Paolo Maldini hevur á italska landsliðnum. Alt bendir á, at Cannavaro setir nýtt met, nú spælt verður um sonevnda Conferations Cup í Suðurafrika. Ein lítil vøddaskaði argar tó í løtuni, og tí er Cannavaro ikki við á liðnum, sum í dag spælir fyrsta dystin í kappingini.



## Útselt upp á trý korter

Danir vilja aftur síggja landsliðsfótbólt. Seinastu árini hevur áhugin fyri danska fótbóltslandsliðnum verið fallandi, men góða gongdin í HM-undankappingini hevur so ruddiliga slóða fyri øktum áhuga. Í september spælir Danmark heimadyst móti Portugal, og tað er longu langt síðani, at tann dysturin var útseldur. Og tá atgongumerkini til heimadystin móti Svøríki tann 10. oktober vórðu sett til sølu fríggjadagin, tók tað bara 45 minuttir at selja hesi.

AB-B68 0-3 (0-1)

# Gestablíðir argjamenn

**B68 hevur ikki tapt í seinastu sjey royndunum. Tað varð staðfest leygardagin, tá toftamenn vunnu greitt á útivølli móti AB. Og argjamenn vóru sera gestablíðir**

*AB*

*B68*

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



*Argjamenn hava verið sterkir á heimavølli í ár, men leygardagin var eingin sum helst ivi, tá B68 so ruddiliga átti síni trý stig uppiborin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Toftamenn fóru aftur ósigraðir av vøllinum um vikuskiftið. Og tað er nær um gerandiskostur eftirhondini. Dysturin á Argjum leygardagin var hin sjeyndi upp í slag, har B68 fekk stig.

AB hevur annars staðið seg væl á heimavøllinum í hesum kappingarárinum. Men toftamenn løgdu líka í hagtølini og greiddu sína skyldu – og meira enn tað.

Úrslitið varð 3-0, og tað kom óvart á fleiri.

### Málini

Og tað gingu ikki fleiri enn fýra minuttir, áðrenn B68 legði seg á odda. Pól Jóhannus Justinussen, sum í miðvikuni var við í sigrinum hjá U21-landsliðnum móti Russlandi, var als ikki ansaður, tá hann setti høvdið á bóltin, sum Øssur Hansen hevði sent innfyri úr vinstru.

Fimm minuttir eftir hvíldina noyddist málverjin Tórður Thomsen aftur í málið eftir bóltinum. Hesaferð var Dánjal Pauli Højgaard málskjútti. Ahmed Keita rann framvið fleiri mótstøðuleikarum, áðrenn hann lat Højgaard bóltin. Hann slapp sær inn um brotsteigarmarkið í høgru og smekkaði til úr spískum.

Keita staðfesti sigurin, tá tólv minuttir restaðu í. Framherjin var fyrstur á bóltinum eftir fríspark, og tá mótstøðuleikararnir ikki fingu bóltin av honum, kundi hann lættliga senda í netið, umvegis stólpan.

### Uppiborið

Tað vildi verið løgið, um greiði sigurin hjá toftamonnum ikki var uppiborin. At vinna við trimum málum móti ongum sigur oftast alla søguna. Og dysturin á Argjum leygardagin var einki undantak.

AB royndi tó at søkja at. Serliga í fyrra umfarinum vóru teir ágangandi í løtum og settu gestirnar undir trýst. Eitt nú var Nikolaj Eriksen nær við, tá hann úr góðari støðu sendi upp um málið.

Í verjustøðu stóðu toftamenn seg væl. Undan steðginum var heimaliðið nógv á bóltinum, men heimaliðið fekk lítið pláss at spæla á. Tað kundi ikki sigast um argjamenninir í støðum.

Serliga í seinna og triðja málunum var AB sera óansið, tá Keita slapp at reika við bóltinum, sum hann vildi.

Ransin N. Djurhuus var dómari á Argjum leygardagin, og hann kom væl frá uppgávuni. Einu ferðina vóru argjamenn hvassir mótvegis dómaranum, tá teir mettu, at bólturin rakti hondina hjá Ndende í feltinum. Men floytan tagdi, og AB fekk einki brotsspark. Ein avgerð, sum ikki var røtt.

### Standa sína roynd

Mikudagin vitjar EB/Streymur á Svangaskarði. Og tá fæst at vita, um tað verður B68 ella sundalagsmenn, sum fara at renna aftaná oddanum komandi tíðina. Við sigrinum á Argjum leygardagin lyftu toftamenn seg á fjórða plássið í Vodafonedeildini. Fimm stig eru til heiðursmerkjaplássini, og ein sigur er alneyðugur, um liðið framvegis skal verða við í kappingini um evropeisku plássini.

AB skal varðveita sætið í deildini. Tað er málsetningurin. Og sum uppflytari kanst tú altíð rokna við, at tú verður flongdur viðhvørt. Soleiðis varð leygardagin. Tað er eingin orsøk at fella í fátt, og longu mikukvøldið hevur liðið møguleikan at reisa seg aftur: Tá vitjar AB í Fuglafirði.

# HB staðfesti oddasessin

**Næstbesta liðið hjá HB er framvegis oddalið í næstbestu deildini. B71 vann fyri triðju ferð upp í slag og líkist einum komandi uppflytara, meðan FC Hoyvík aftur misti stig um vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað stendur seks feløgunum í boði at flyta upp í Vodafonedeildina. TB og VB/Sumba royna at syrgja fyri, at Suðuroyggin eigur pláss í bestu føroysku fótbóltsdeildini. B71 er fótbóltsstoltleikin á Sandoynni, Skála leingist eftir frálíku tíðunum, tá liðið myndaði oddan í føroyskum fótbólti, MB vil vísa 07 Vestur hvør ræður í Vágum, meðan FC Hoyvík er eitt felag í stórari menning og vil bjóða hinum liðunum í høvuðsstaðnum av. Men hóast tað eru tað næstbesta liðið hjá HB, sum er oddalið í næstbestu deildini. Og um vikuskiftið staðfestu teir sín oddasess, sum teir hava havt seinastu trý umførini.

### HB vann greitt

Tað var eingin ivi í Gundadali leygardagin. HB vann við fýra málum móti ongum, og greiði sigurin var væl og virðiliga uppiborin. Liðskiparin Jákup Slættalíð skallaði heimaliðið á odda í fyrra hálvleiki, og eftir hvíldina staðfestu Tróndur Sigurðsson, Christian Mouritsen og Atli Mikkelsen sigurin. MB hevur framvegis bara vunnið sær tvey stig í hesum kappingarárinum, og tað er lítið sum bendir á, at gongdin verður broytt.

### B71 sigraði aftur

B71 líkist í løtuni einum komandi uppflytara. Sandoyingar vunnu um vikuskiftið fyri triðju ferð upp í slag, og er framvegis á øðrum plássi – eitt stig eftir oddaliðið. Leygardagin høvdu teir ongar trupulleikar, tá næstbesta liðið hjá Víkingi vitjaði.

Høgni Midjord, Mads Hentze og Clayton Soares stóðu fyri málunum hjá heimaliðnum í 3-1 sigrinum.

### TB basti hoyvíkingar

Tað eydnaðist heldur ikki FC Hoyvík at fáa stig um vikuskiftið. Liðið hevur nú tapt seinastu fýra ferðirnar, og tað verður ikki longur práta hart um uppflyting.

Hesaferð vitjaðu hoyvíksingarnir á Tvøroyri, har TB vann 3-1. Tórður Mortensen skjeyt tvey av málunum hjá heimaliðnum, og Gilli Sørensen staðfesti sigurin. Málið hjá FC Hoyvík stóð Ike fyri, tá tvøramenn vóru á odda fyri trimum.

### VB/S greiddi sína skyldu

VB/Sumba rennur framvegis aftaná liðunum, sum hava møguleika at flyta upp. Trý stig vóru tískil neyðug, tá liðið vitjaði hjá botnliðnum á Skála um vikuskiftið. Skála hevur seks stig til bjargingina í næstbestu deildini, men heldur ikki hesaferð eydnaðist tað teimum orangulittu at ota seg nærri áttanda plássinum.

Tá sá tó bjart út, tá heimaliðið legði seg á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Men Heini Vatnsdal, við brotssparki, og Eyðstein í Lágabø syrgdu fyri, at VB/Sumba fekk øll stigini. Felagsliðið hevur als ikki ráð at tapa stig móti niðaru liðunum og frøddist sjálvsagt um sigurin.

### NSÍ vann grannauppgerðina

NSÍ vann sær um vikuskiftið trý sera týdningarmikil stig í royndini at bjarga sætinum í deildini. Runavíkingar vunnu 4-3 á grannunum B68 og otaðu seg harvíð nærri oddanum, hóast liðið er á sjeynda plássinum. Kappingin er sera jøvn, og liðið er bara fimm stig frá TB, sum er nummar trý. B68 hevur ikki havt vind í seglunum seinastu vikurnar, og er dottið niður á fimta plássið.